# 20 kr um dagin

**Tørvur er á at seta barnafátærkadømi á breddan, og alneyðugt er at varpa ljós á tær umstøður, vit sum samfelag bjóða børnum, sum liva í fátøkum familjum. Í menniskjum góður tokki hevur tí valt at halga barnarættindadagin 20. november til tey børn í Føroyum, sum hava tað allartruplast, nemliga tey sum skulu lívbjarga sær fyri 20 kr um dagin.**

Í samband við barnarættindadagin setti Í menniskjum góður tokki sær fyri, at hyggja nærri at liviumstøðunum hjá teimum 533 børnum, sum liva í teimum 300 fátækastu barnafamiljum, sum fingu jólahjálp í fjør. Myndin sum kom burtur úr hesum er døkk, og sigur eina søgu um eitt samfelag á skeivari kós.

At tað í Føroyum finnast 300 familjur, har hvør familjulimur bert hevur 20 kr um dagin at liva av, ber boð um eitt samfelag, sum ikki tekur trupuleikan við fátækradømi í álvara, og sum hevur valt at lata eyguni aftur fyri fátøku børnunum.

**Vit hava vitanina, men kortini hendir onki**
Í nógv ár var grundgevingin og umberingin fyri onki at gera við fátækradømi í Føroyum, at vit vistu ov lítið um støðuna, høvdu ov fá hagtøl og kjakið gjørdist tí ofta eitt kjak, um vit høvdu nakað fátærkadømi í Føroyum.

Í dag vita vit, at vit hava 100 tals børn og 100 tals familjur sum liva í djúpum fátækradømi. Vit fáa á hvørjum árið hagtøl frá Hagstovuni, sum neyvt siga, hvør tað er, sum er í fátækraváða. Vit vita hvat tað er, sum avgerð um tú verður raktur av fátækradømi ella ikki. Tað snýr seg í stóran mun um aldur, kyn og parlagsstøðu. Sambært hagstovuni:

- Størsti bólkurin í fátækraváða eru børn 0-18 ár. Hesi eru heili 1322.
- Fleiri kvinnur enn menn eru í fátækraváða.
- Fleiri stakir uppihaldarar eru í fátækraváða enn pør.

Hóast vit hava havt hesa vitan í nógv ár, so er onki hent, sum bøtur um barnafátækradømi. Barnarættindasáttmálin sigur púra greitt, at tá foreldur ikki hava møguleika at tryggja børnum sínum góð lívskor, so hevur samfelagið **skyldu** at gera tað. Men hesa skyldu hevur samfelagið ikki tikið á seg, og politiska skipanin hevur í áravís latið sum um hesi børn ikki eru til.

Men tað eru tey. 533 teirra liva ein gerandisdag, har tey hava eina 20 krónu at lívbjarga sær við um dagin. Henda 20 krónan skal røkka til mat, tannkrem, klæðir, frítíðarítriv, heilivág, føðingardagar o.a., sum hoyrir til í gerandisdegnum hjá eini føroyskari familju.

Børnini í hesum familjum kenna øll avleiðingarnar av fíggjarliga sperdu støðuni, og teirra gerandisdagur líkist lítið honum, sum onnur føroysk børn liva.

Tí tað eru hesi børn:

- sum ikki halda føðingardag, tí ráð ikki eru til tað.
- sum ikki ganga til nakað frítíðarítriv, tí ráð ikki er til tað.
- sum verða happað, tí tey bara ganga í endurnýtsluklæðum, tí ráð er ikki at keypa nýtt.
- sum ofta flyta, tí íbúðin er ov vánalig ella ov dýr. Onnur flyta av landinum, tí tey og teirra familja hava ikki ráð at búgva her.

- sum stúra, tí tey vita at peningurin, tey sum familja hava at liva av, ikki røkkur til allan mánaðin.
- sum bara mugu hyggja at, meðan javnaldrar og vinir ferðast, fara á matstovu, biograf, námsferðir o.s.fr.Tey luttaka ikki, tí tey hava ikki ráð.
- sum ikki eta eina heita máltíð hvønn dag, summi heilar vikur, tí ráð eru ikki til tað.

Nógv av børnunum kenna seg eisini einsamøll, útilokaði frá at taka lut ella byrgja seg sjálvan inni fyri at forða fyri, at onnur finna útav, hvussu vánalig støðan er heima.

**Føgur orð metta ongan!**
Vit fara uttan iva í aðalorðaskiftinum í løgtinginum í dag um barnarættindi at hoyra føgur orð um týdningin av at skapa børnunum góðar umstøður, men hesi orð metta onki barn og skapa ongum barni betur umstøður at mennast og búnast í. Tað fátøku børnini hava tørv á er, at støðan hjá teimum verður tikin í álvara, og at munagóð átøk verða framd, sum hjálpa teimum og familjunum burturúr fátækradøminum. Hesi børn hava ikki tíð at bíða, tí í morgin er aftur ein dagur og avbjóðingin er tann sama sum dagin frammanundan. Hvussu langt kunnu vit fáa 20 krónina at røkka í dag?

Hvussu kunnu vit í einum ríkum samfelag sum okkara rættvísgera, at vit hava børn, sum liva í djúpum fáækradømi?

**Lat tølina tala**
Tann vitan vit hava um fátækraváða frá tølinum frá hagstovuni, og tað innlit Í menniskjum góður tokki hevur í liviumstøðurnar hjá hesum familjum, ger, at tað als ikki er so trupult at fremja batar, sum veruliga muna hjá hesum familjum.

Tølini fyri tær 300 fátækastu familjurnar visa heilt greiða mynd, hvør tað er sum er fátækur, hví tey eru fátøk, og hvør aldurbólkur av børnum er harðast raktur.

**Parlagsstøða og kyn**
Stakir uppihaldarar eru 3. ferð so nógv umboðaðir í teimum 300 familjum enn pør eru. Sigast skal eisini, at hyggja vit nærra at býtinum millum støku upphaldarnar, so eru 86% av teimum kvinnur og 14% menn.

**Hvagar stavar inntøkan frá?**
Tað sum fellir í eyga er, at nógvar av teimum 300 fátækastu familjunum fáa veitingar frá almennum skipanum so sum forsorg, sjúkradagpening, fyritíðarpensjón og lestrarstuðul. 18% av familjunum fáa veiting frá ALS. Telja vit saman so eru 69% av fátækastu familjunum knýttar at hesum skipanum. Hetta er ein greið ábending um, at tær veitingar sum folk fáa eru ov lágar og taka ikki atlit til kostnaðarstøði, og hvat skal til fyri at liva eitt virðiligt lív í Føroyum.




Skipanirnar eru tí beinleiðis við til at skapa barnafátækradømi.

Hyggja vit at teimum sum eru á arbeiðsmarkinum eru fleiri familjur í fátækradømi, sum arbeiða á almenna/kommunala arbeiðsmarknaðin enn á privata.

Heili 86% av teimum 300 fátækastu familjunum eru umvegis veitingar av ymiskum slag ella í sínum starvi knýtt at almennu Føroyum, og tí er tað ongin ivi um, at almennu Føroyar eisini eigur ábyrgdina av, at bøta um støðuna hesar familjur eru í.

**Flestu búgva til leigu**




Hyggja vit nærri at, hvussu hesar 300 familjurnar búgva, so eru tað 60% av teimum sum búgva til leigu, meðan 31% hevur egin hús ella íbúð. Ongin ivi er um, at soleiðis bústaðarmarknaðurin í Føroyum er skipaður, so er tað steinur omaná byrðu hjá familjunum.

Trupult er at finna bíligan bústað, serliga í høvuðsstaðnum og oftani er standurin á leigubústøðunum heldur ikki góður. Eitt bústaðarískoyti hevði komið væl við hjá teimum fátøku familjunum, sum búgva til leigu, og hevði lætt um gerandisdagin. Familjurnar sum búgva til leigu flyta oftani, antin tí íbúðin er ov dýr, ov lítil ella í ringum standi. Hetta skapar ein stóran ótryggleika hjá børnunum.

**Hvat í landinum búgva tær?**
Tær 300 familjurnar búgva kring alt landi og í flestu økjum er so gott sum samsvar millum talið av fátøkum familjum og fólkatalið í økinum. Tó síggja vit eina rættiliga stóra yvirumboðan í Norðoyggjum, Tað búgva 12% av fólkunum í Norðoyggjum, men 20% av fátækastu familjunum eru har. Trupult er at siga hvør orsøkin til hetta er, men áhugavert hevði verið at hugt nærri at hví so er.




Vit síggja hinvegin eina undirumboðan í Eysturoynni, har 23% av fólkinum búgva, men bert 17% av fátøku familjunum búgva í Eysturoynni. Orsøkirnar eru helst lágt arbeiðsloysi og nógv arbeiðspláss eru í Eysturoynni. Tølini frá Hagstovuni um fátækraváða eru eisini lág í Eystyroynni

**Flest fátøk smábørn**
Í teimum 300 familjunum, sum hava 20 kr um dagin til hvønn familjulim, eru 533 børn. Størsti aldursbólkurin av teimum eru tey frá 0-6 ár. Tey eru heili 48% í tali, og eru tí at finna í nógvum vøggustovum og dagstovnum kring landið. Vit vita ikki um nakað ella onki verður gjørt fyri hesi børn á teimum stovnum, har tey ganga. Vit vita heldur onki um, hvussu lætt ella trupult tað er at bróta sosiala arvin í Føroyum. Men vit vita úr grannalondum okkara, at hóast tey gera rættliga nógv fyri at bróta sosiala arvin, so er hetta ógvuliga trupult.




Her hjá okkum verður onki yvirskipað miðvíst arbeiði gjørt hesum viðvíkjandi, so stórur vandi er fyri, at børn sum vaksa upp í fátærkadømi, sjálvi verða fátøk.

Fyri at byrgt upp fyri einum av avleiðinginum av at liva í fátækradømi, kundu kommunur kring landi avgjørt, at øll børn undir skúlaaldur hvønn dag fingu eina heita og góða máltíð á stovinum tey ganga í. Hetta hevði munað væl hjá teimum fátøku familjunum og tryggja hesum børnum eina heita máltíð hvønn dag.

At aldurbólkurin 0-6 ár er so stórur, samsvarar eisini væl við tølini frá hagstovuni sum visa á, at tað eru stakir uppihaldarar við smábørnum millum 0-5 ár, sum eru í størsta fátærkaváða av barnafamiljunum.

**Ein her og nú loysn sum munar**
Soleiðis sum støðan er í dag, so er ilt at fáa eyga á hvør almennur myndugleiki eigur ella vil taka ábyrgdina av fátæka barninum. Tí fáa hesi børn ikki tað hjálp, sum teimum tørvar fyri at kunna taka lut, kenna seg sum part av einum felagsskapi, sleppa undan stúranini um peningur nú er til mat, og bara liva eitt vanligt barnalív.

Vit hava ongantíð í Føroyum veruliga viðurkent, at vit hava fátækradømi, tí hava vit heldur ikki skipanir, sum eru útbúnar til at lofta fleiri 100 fátøkum børnum. Hvør mynduleiki kann hjálpa, tá eitt húski við mammu og trimum børnum hevur eitt tómt køliskáp? Hvør myndugleki eigur svanga barni? Hvør eigur ábyrgdina?

Hví mugu sjálvbondnir felagsskapir ferð eftir ferð taka um endan? Hvør er tað sum svíkur?

Løgtingið hevur ein gyltan møguleika áðrenn tey fara í jólafrí at visa ábyrgd yvir fyri hesum børnum og geva teimum eina jólagávu sum gleðir og varðar alt árið. Løgtingið kann játtað 20-25 milliónir kr eyka til barnaískoytið til stakar uppihaldarar, og víðka skipanina eisini til at umfata fíggjarliga sperd pør við børnum. Hetta hevði hækkað barnaískoytið fyri hvørt barni við 1500 kr, og hevði gjørt gerandisdegin hjá nógvum børnum munandi betur. Er nøkur betur íløga enn tað?

Vit hava ein átrokandi trupulleika, sum snýr seg um at tryggja, at øll børn í Føroyum kunnu eta seg mettan hvønn dag, og nakað má gerast her og nú.

Tá aðalorðaskiftið um barnarættindi er av í løgtinginum, og hesum barnarættindadagurin er farin at halla, so er at vóna at tey 533 børnini við eini 20 krónu at lívbjarga sær við um dagin eru tikin í álvara, og semja er í løgtinginum um, at hetta kunnu vit ikki sum samfelag bjóða okkara børnum – hvørki á barnarættindadegnum ella aðrar dagar í árinum.

**Góðan Barnarættindadag.**